**VIÐMERKING**

# Atfinningarsemi í bløðunum

**Hans Birigir Hansen**

Tað hevur verið ein avgerandi fyritreyt/grundarlag, fyri at koma víðari í tí dagliga, at vera atfinnigarsamur. Eg havi víst á teir grundleggjandi skeivleikar í øllum etableraðum virksemi. Eg havi víst á nakað betri at seta ísatðin fyri, við at fáa smidligari og einfaldari lóggávu, skipanir, mannagongdir, kunngerðir og reglugerðir innan fyri alt fjøltáttað vinnuligt virksemi í Føroyum.

Øll skulu læra at arbeiða sjálvstøðugt innan áðurnevnda og úti á tí almanna og privata arbeiðsmarknaðinum. Á arbeiðsplássum, í skiftisvaktum og í øllum skipaðum arbeiðs, familju og frítíðarlívi.

Tað eru avbygdar- og býarfólk, útlendingar uttanfyri og í Havnini, og teirra valdsmentalitetur og tann rikni familju-, vina- og kenningarpolitikkurin, ið skapar fortreytir/grundarlag fyri stættarmunum.

Eg haldi ikki, at tað er røtt mannagongd, at neyðugt skal verða við einum uppsøkjandi arbeiði, børn, ungdómar, lesandi og lærlingar dagliga gera. Hetta undirgrevur samfelagsmoralin og lønarsáttmálar.

Upprunaliga skuldi eingin verið arbeiðsleysur/tøkur undir »ALS« og »Almannastovuskipanum«, legði øll tann bíliga arbeiðsmegin í dag, kring landið og í »Havnini«, teimum ikki fótin fyri at koma út aftur. Børn, ungdómar, lesandi og lærlingar, hava ikki somu samfelagsskyldur at røkja, sum tey undir áðurnevndu skipanum. Hetta vil ein gera vart við, og finnast harðliga at, úti í øllum skipaða kjakinum.

Eg dugi at síggja avleiðingarnar við tí støðugt vaksandi stagnatión, tá ið øll vilja steðga upp at liva og virka normalt, menniskjaligt, moralskt, etiskt, sum mannaverður, kring landið og í »Havnini«.

Tað er bara at hyggja eftir øllum, ið sett eru í bás eftir stættarmuni, ið er ein gerandiskostur kring landið og í »Havnini«, og hvørs arbeiðsgevarar, kapitalistar, viðgera á sama hátt, eins og svørtur trælirnir.

Eg havi framt uppreistur ímóti ráðandi kreftum, skipanum, yvirvøldum, almenningi, avbygdar- og býarfólkum, útlendingum í Føroyum, ið eru kriminellir lógbrótarar í hvørjari kommunu í dag. Tað er ikki minst galdandi allar samfelagssnúltandi bólkar og stættir, ið njóta samfelagságóðan, uttan at rætta hond frá síðu í hvørjari kommunu. Dovnu, forkelaðu leiðingar, ið bara sita heima við hús.

Vit síggja, at øll ófaklærd og faklærd, fáa ikki fortreytir/grundarlag at liva og virka eftir teimum førleikaevnum, ið ein hevur í hvørjari kommunu, tá øll eru eins og svørtu trælirnir, ið fáa koyrilin/pískin.

Einaræðis valdsharrar og viðhaldsfólk teirra innan kreftir/skipanir og yvirvald fremja brot á »ST-samtyktir um mannarættindi«, ið er ein dagligur gerandiskostur í hvørjari kommunu. Eg havi nógv at stríðast fyri. At varðveita vunnið frælsi, rættindi, privatlívsfrið og sjálvstøðugt vinnuligt virksemi og at koma víðari í tí dagliga gerandislívinum í Havnini/Suðurstreymoy komandi árini.

# Til minnis um Sofus Hansen

## føddur 01.10.53 – deyður 05.05.03

Ikki vardi tað meg, tá babba ringdi til mín mánadagin 5. mai at tað skuldi vera deyðsboðini um Sofus. Nógvir tankar fóru ígjøgnum høvdið á mær tað løtuna… Tað kundi ikki passa at Sofus ikki var í millum okkum meira? Ikki Sofus, hann var jú av raskastu monnum. Eg visti, at hann var sjúkur, men at sjúkan so skjótt skuldi fáa takið á honum, og at hann ikki skuldi klára at hóra undan, tað man mangur hava ilt við at skilja. Men Guds vegir eru ikki altíð okkara vegir.

Mangan verður sagt, at Jesuspápi tekur tey bestu og raskastu menniskjuni fyrst og tá eg hugsi um Sofus, ja so má tað nokk vera satt.

Minnist ikki ordiliga nær eg kom at kenna Sofus, haldi altíð at eg havi vitað hvør hann var. Vit hava altíð verið ógvuliga væl og eg havi altíð verið so góð við hann. Hann var jú so nemmur at verða góður við, altíð í góðum lag altíð eitt smíl og at geva eitt klemm, tað var nakað ið hoyrdi Sofusi til.

Sofus hevur altíð verið av raskastu monnum, hevði altíð okkurt at takast við og hann var altíð klárur við einari hjálpandi hond tá í á stóð. Hann hevði so nógvar góðar eginleikar, men serliga var tað ein eginleiki, sum hann hevði fram um aðrar og tað var at hann dugdi so væl at fáa ein at føla seg, sum nakað serligt, man merkti ordiliga at hann var góður við ein og hann vísti altíð áhuga í einum. Spurdi hvussu man hevði tað, hvat man gjørdi og hvussu eins kæru høvdu tað.

Sakni at síggja og hoyra hann til dyst við Løkin, tað er, sum um at hann bara eigur at vera har og man eigur at hoyra hann. Fótbólturin ella ítróttur sum heild var nakað, sum Sofus gekk høgt uppí. Og var onkur dystur á vøllinum ella í høllini so var hann næstan altíð har. Hann stuðlaði altíð tykkum Kári, Mortan og Jóhonnu í teimum ítróttargreinum sum tit íðkaðu, hann var so stoltur av tykkum, tað sást langan veg. Og tá hann rópti á tykkum so var tað altíð góði ella góða, tað var so fitt at hoyra! Og seinastu árini hevði hann altíð ein lítlan fylgisvein, Karstin. Minnist so væl tann dagin tá eg møtti honum, tá hann fortaldi at hann var blivin pápi enn einaferð. Hann skein sum ein sól. Tíanverri fingu tit báðir ikki so nógv ár saman.

Góða Klara og lítli Karstin, hugsi ofta um tykkum og biði fyri tykkum um at Jesuspápi skal styrkja tykkum í sorg tykkara. Somuleiðis Kári, Jonna, Maria. Mortan, Oddvá, Jóhanna og Agnar, eg minnist tykkum í bønum mínum. Minnist bara til at søkja Harran um hjálp og styrki Hann svíkur aldrin. Sjálvt tá alt tykist so vónleyst og tungt so er Jesuspápi hjá tykkum. ALTÍÐ.

Hvíl í friði góði Sofus, vit síggjast…

**Ein vinur**

# Føroyingar populerir í Finlandi

**Beint aftaná ólavsøku fór barnasjónleikarafelagið Dramaverkstaðið til Finlands, har barnasjónleikarastevna var á skránni teir næstu 10 dagarnar. – Vit føroyingar vóru ógvuliga populerir, sigur ferðaleiðarin Hjørdis Johansen, vælnøgd við avrikið hjá føroysku børnunum**

SJÓNLEIKUR
*Hans Kárason Mikkelsen*

Barnasjónleikarastevnan er eitt afturvendandi tiltak í norðanlondum. Fyri tveimum árum síðani varð stevnan í Svøríki, og í 2005 verður hon í Danmark. Stevnan er fyri børn í aldrinum 8-13.

Tey føroysku børnini hava vant sjónleikin »Ikki eitt orð um morð« síðani síðsta heyst. – Tað gekk ógvuliga væl hjá børnunum at framføra leikin á stevnuni, sigur Hjørdis Johansen, sum sigur seg vera vælnøgda við ferðina, ið byrjaði 1. august og endaði 11. august.

Áhugin fyri føroyingunum á Finlands-ferðini varð stórur, og finska blaðið Österbottningen hevði grein tann 5. august um føroysku børnini og teirra avrik. Blaðið skrivar, at børnini vóru væl vand og glað fyri at spæla. Hetta játtar Hjørdis Johansen, og hon leggur afturat, at tey trivust ógvuliga væl hesar dagarnar, tey vóru í Finlandi.

Tað vóru umleið 70 fólk á stevnuni, og Hjørdis sigur, at hetta eru færri enn vanligt. – Tað plagar at verða nógv fleiri fólk, onkuntíð upp til 600 børn, sigur Hjørdis og skoytir uppí, at tað vórðu færri luttakandi lond í ár enn undanfarin ár.

Tað var MÁF, Meginfelag Áhugaleikara Føroya, sum stuðlaði sjónleikarferðini til Finlands, og væl umtóktu føroysku børnini fingu eisini peningaligan stuðul úr ymsum norðurlendskum grunnum.

Spurd um norðurlendska Barnasjónleikarastevnan nakrantíð kemur til Føroya, sigur Hjørdis Johansen, at tað er møguligt.





*Vit føroyingar vóru ógvuliga populerir, sigur ferðaleiðarin Hjørdis Johansen, vælnøgd við avrikið hjá føroysku børnunum*

# Útnorðurráðið vitjar í Runavík

VITJAN
*Vilmund Jacobsen*

**Runavík:** Útnorðurráðið, sum er í Føroyum í hesum døgum, hevði sín árliga fund á Eiði hósdagin.

Í gjár vitjaðu umboðini, sum telja eini 20 fólk tilsamans, í Runavíkar kommunu.

Rodmundur Nielsen, býráðsformaður, sigur, at ráðið ynskti at vitja kommununa og síggja ein part av vinnulívinum her.

– Vit avgjørdu at vísa umboðunum Æðuvík, maskinverkstaðin, FJM og bátavirkið, AWI-Boats.

Rodmundur sigur, at kommunan vildi vísa umboðunum bygdina, Æðuvík, tí hetta er ein lítil bygd í kommununi, sum liggur tætt við sjógvin.

– Vit halda eisini, at tað hevur týdning, at útlendsku umboðini síggja, hvat maskinídnaðurin og bátaídnaðurin í kommununi hava at bjóða. AWI-Boats hevur selt nógvar bátar til Grønlands, og við í ferðini eru eitt nú grønlendingar, sum kunnu hava týdning fyri føroyska marknaðin har yviri.

Á vitjanin í Runavíkar kommunu, var Útnorðurráðið eisini ein túr við einum nýggjum AWI-Star báti, sum bátavirkið hevur bygt.

At enda var Runavíkar kommuna vertur fyri einum døgurða í kappróðrarneystinum á Glyvrum.



# Ein dagur saman við Kennedy

**Í vár varð undirritaði á tiltaki, har stórur partur av Kennedy-familjuni varð til staðar. Millum kendu fólkini varð Edward Kennedy, beiggi myrda forsetan John F. Kennedy**

*Hans Kárason Mikkelsen*



*Edvard Kennedy og John F. Kerry, sum er ein av favorittunum at gerast forsetavalevni hjá Demokratunum til forsetavali í 2004*

*Mynd: Reuter*

Eftir at John F. Kennedy bleiv myrdur í 1963, ferðaðist beiggi hansara Robert nógv runt í USA og reisti minnisvarðar fyri farna forsetan. Ein av minnisvarðunum er »The John F. Kennedy Library« í Boston, Massachusetts. Á hesum kenda bókasavni verða nógv tiltøk hildin til minnis um Kennedy.

Eitt av hesum tiltøkum er »Profile in Courage Award Ceremony,« sum heiðrar politikarum, sum hava víst serligt dirvi í sínum starvi. John F. Kennedy varð nevniliga sjálvur av mongum hildin at vera ein djarvur politikari, ið vísti stórt mót, serliga undir Kuba-kreppuni, tá heimurin varð nærri enn nakrantíð upp á kjarnorkukríggj.

»Profile in Courage« hátíðarhaldið til minnis um Kennedy varð hildið fyrst í mai í ár, og varð undirritaði tilvildarliga innbjóðaður til hetta tiltak. Tveir næmingar frá lærda háskúlanum Harvard skuldu við til hendingina og umboða skúlan, tí John F. Kennedy gekk sjálvur á Harvard. Tað varð avgjørt við lutakastið, hvørjir hesir báðir næmingarnir skuldu vera, og fall tað á ein amerikanara úr Kalifornia og ein føroying.

Tað er ein mánað undan sjálvum tiltakinum, at tað verður kunngjørt, at vit skulu umboða skúlan. Vit hugsa so ikki meira um hetta og fóru glaðbeintir í skúla aftur. Ikki fyrrenn eina viku undan tiltakinum síggja vit eitt brot á tíðindastøðini CNN, har greitt verður frá, at stórt hátíðarhald verður fyri ymsum politikarum í Boston, og at toppurin í USA verður til staðar. Vit hugsa við okkum sjálvum, at hetta mundi vera størri, enn vit av fyrstan tíð høvdu gjørt okkum far um.

Vit blíva meira og meira spentir um hetta her, og eg byrji at hugsa um, hvat fyri klæðir mundu hóska best til slíkt tiltak. Vinmaðurin hjá mær úr Kalifornia, sum jú eisini varð bjóðaður, gav sær ikki so nógv far um klæðir, men byrjaði heldur at lesa eina amerikanska bók, ið líktist »Takt & tone« hjá Emmu Gad. – Ein eigur at vera væl fyrireikaður at møta amerikansku elituni, helt hann flennandi fyri.

Endiliga er so dagurin, har vit skulu møta á áðurnevnda bókasavni hjá Kennedy. Men áðrenn hetta hava vit sjálvandi funnið útav, hvørji klæðir vit skulu í, og hvussu vínglasið eigur at haldast.

Dagurin er 12. mai, og klokkan er eitt um eftirmiddagin. Vit taka bussin frá skúlanum til Kennedy-bókasavnið niðri á havnalagnum í Boston. Amerikanski vinmaðurin sigur, at vit munnu nokk vera teir einastu í almennum bussi. Eg gevi honum rætt beinanvegin, tí eg síggi fleiri limousine-bilar koma trillandi spakuliga inneftir.

Vit fara inn við góðum treysti, men áðrenn vit sleppa inn, mugu vit vísa samleikaprógv. Haraftrat skulu vit ganga ígjøgnum eina elektroniska eftirlitsskipan fyri at tryggja, at vit ikki hava vápn á okkum. Langt um leingi koma vit so inn í sjálvt bókasavnið, har fólkini samlast í einum stórum sali við einum palli. Nógv fólk eru at síggja, og amerikanarin letur meg vita, at nógvir limir í amerikonsku Kongressini eru her, umframt nakrir guvernørar. Eg meti, at nakað væl yvir hundrað fólk eru á staðnum. Eg kenni ikki tey nógvu av teimum, men tað er áhugavert at síggja samansetingina av fólkinum. Meirilutin er mannfólk í svørtum klædningi, men tey fáu konufólkini sum eru, skilja seg týðuliga úr mongdini við litføgrum kjólum og penum smílum.

Vit báðir royna, at arbeiða okkum inn ímoti miðjuni í fólkamongdini, og vit seta okkum á tilluttaðu stólarnar. Aftanfyri øll fólkini eru eini 15 fjølmiðlafólk. Tiltakið er um at byrja, og fólk eru við at sessast. Vit venda øll móti pallinum, og á pallinum standa einir tíggju tómir stólar.

Vit bíða eitt spentir. Vit vita væl, at tað er Kennedy-familjan, sum fer at koma út á pallin um eina løta, men hvørgin av okkum hevur møtt teimum fyrr. Myndatólini eru vælstillaði aftanfyri okkum, og tað er stilt í salinum.

Løtu seinni kemur maður inn á pallin og bjóðar vælkomið. Eftir eina stutta røðu heitir hann á okkum øll um at reisa okkum upp, tí nú kemur vælumtókta Kennedy-familjan inn á pallin. Vit reisast úr sessinum og byrja so spakuliga at klappa, meðan tey koma spákandi inn. Onkur eldri limur í familjuni er við henda dagin, og tí ganga tey ógvuliga spakuliga inn á pallin. So tað er ein góð løta hjá okkum at standa og klappa.

Langt um leingi setast tey øll niður á pallinum. Uttaniva tann kendasti í familjuni er Edward Kennedy, sum situr við síðuna av tí eisini kendu Caroline Kennedy. Eg kenni ikki nakran annan í familjuni, so eg má spyrja amerikanaran. Hann letur meg so vita, at ikki øll eru Kennedy-fólk, tí tríggir menn eru amerikanskir politikarar, sum skulu heiðrast í dag.

Hesir menn skulu heiðrast við »Profile in Courage« prísínum, sum verður latin av Kennedy-familjuni einaferð um árið. Teir eru allir suðurstatsmenn, og hava teir hvør í sínum lag arbeitt fyri meira tolsemi og forstáilsi millum svørt fólk og hvít fólk. Hetta verður hildið at vera serliga djarvt, tí í amerikonsku suðurstatunum trívist rasisman væl, og eru tað nógv maktfull fólk, sum royna at kúga svarta fólkið. Og um tú ert hvítur og roynir at arbeiða fyri meira integratión, so er skjótt at fáa óvinir. Teir mennirnir, sum skulu heiðrast, fingu nakað nógvar óvinir í sínum arbeiði, tí onkur av teimum misti sítt politiska starv.

Tað er Edward Kennedy, bróðir John, sum handar teimum prísin. Hann sigur nøkur orð um, hvussu týdningarmikið tað er, at eitt land hevur djarvar politikarar og leiðir tankarnar aftur á John F. Kennedy sum fyrimyndina í hesum sambandi. Edward leggur aftrat, at tað er eisini týdningarmikið, at virðismeta tað politiska yrkið, tí tað er ein stór uppgáva at taka á seg.

Aftaná prís-handanina fara vit á eina sokallaða privata reseptión, har pinnamatur og okkurt at drekka er at fáa. Tað er her, at vit fáa høvi at práta við tey ymisku fólkini, sum vóru inn í salinum. Vit heilsa m.a. upp á Roy Barnes, sum tá varð guvernørur í Georgia. Edward Kennedy er eisini at síggja, sum vit fáa tíverri ikki práta við hann - men hann gevur okkum hondina.

Ein áhugaverdur dagur, staðfestu vit báðir skúlanæmingarnir millum topparnar í USA.